# KVINNUR Á VØLLIN

2021-2025

#BIÐUMBÓLTIN



## STØÐAN Í DAG*

### TILMELDAÐI LIÐ *2020




### SKRÁSETTIR SPÆLARAR *juli 2021




### STARVSNEVNDARLIMIR






## FORORÐ





**Christian F. Andreasen**
FORSETI

**Føroyar skulu vera heimsmeistarar í luttøku. Tað er okkara greiða mál, sum vit hava sett okkum fram til 2026.**

Ein fortreyt fyri at røkka hesum málinum er, at vit skulu hava enn fleiri við, og hetta ger seg ikki minst galdandi á gentu- og kvinnusíðuni. Tí vilja vit hava fleiri gentur og kvinnur á vøllin. Men ikki bara tí.

Fótbóltur hevur nógv gott at bjóða kvinnum – og øvugt. Kvinnur geva fótbóltinum meira styrki og innihald, bæði á og uttanfyri vøllin. Fjølbroytni og ymiskir førleikar eru ein styrki í nevndarhøpi, og føroysku fótbóltsfeløgini gerast bara betri og ríkari av at hava javnvág millum kvinnuligar og mannligar limir.

At fleiri kvinnur gerast virknar í føroyskum fótbólti, fer tí ikki bert at flyta kvinnufótbóltin fram á leið, men føroyskan fótbólt yvirhøvur. Tí vilja vit eisini koma hartil, at vit ikki longur tosa um kvinnufótbólt og mansfótbólt. Vit vilja tosa um fótbólt. Tí fótbóltur skal rúma øllum, óansæð kyn, aldur, førleikar og aðrar hugsandi ymiskleikar.



**Anja Rein**
FORKVINNA Í KVINNUNEVNDINI

**Gentur og kvinnur eiga sítt sjálvsagda pláss í fótbóltsfamiljuni, og vit kunnu flyta okkum langt fram á mestsum øllum økjum.**

Tí er neyðugt at seta eina greiða og málrættaða kós fyri okkara átøk komandi árini. Hetta hava vit nú fingið við hesi menningarætlanini.

Nú ræður um at umseta ætlan til veruleika, og skal tað eydnast okkum, so mugu vit øll lyfta í felag. Vit kappast og stríðast á vøllinum, og har vilja vit hvør í sínum lag vinna. Men allar hinar løturnar, tá vit venja og gera klárt til næsta dyst, tá mugu og skulu vit spæla saman. Tá eru vit øll á sama liði.

Við átøkum, verkætlanum og tilboðum til spælarar, venjarar og feløg, skapa vit karmar og møguleikar fyri menning, og harvið seta vit bóltin í spæl.

Nú mugu vit sjálvar – kvinnur í føroyskum fótbólti – eisini biðja um bóltin og bjóða okkum fram.

## TILGONGD

Arbeiðið við at menna og orða eina langtíðarætlan fyri kvinnur í fótbólti hevur verið ávegis leingi. Síðan fyrstu landskappingina fyri kvinnur miðskeiðis í 80'unum og knapt 40 ár fram, hevur umrøðan og umdømið hjá kvinnufótbóltinum verið skiftandi.

Meðan føroyskur mansfótbóltur hevur tikið seg sera nógv fram seinastu árini, er ferð ikki á sama hátt komin á menningina á kvinnusíðuni. Hetta skal hendan langtíðarætlanin vera við til at broyta.

Í 2019 kom áseting í gildi um, at minst ein kvinna skal vera í starvsnevnd FSFs, og í 2020 var umsitingarligt starvsfólk sett í fulltíðarstarv við ábyrgd av kvinnusíðuni.

Við hesum var arbeiðsorka eisini sett til at orða eina langtíðarætlan.

Eftir vitjanir í feløgunum, evnisdagar og verkstovur, umframt óteljandi samrøður við spælarar, venjarar og aðrar partar av føroysku fótbóltsfamiljuni, er komið fram til hesi fokusøkini:

1. ÚRVAL OG LANDSLIÐ
2. LUTTØKA
3. FELØG OG KAPPINGAR
4. LEIÐSLA OG ARBEIÐSMEGI
5. UMRØÐA OG UMDØMI



## VISJÓN

FÓTBÓLTUR GEVUR GENTUM JAVNRÆTTIS LÍKINDI AT SKARA FRAMÚR OG EYÐNAST – SJÁLVAR OG SAMAN

## MISSIÓN

VIT SKAPA KARMAR OG MØGULEIKAR HJÁ GENTUM OG KVINNUM AT TRÍVAST OG MENNAST Í OG VIÐ FÓTBÓLTI



## VIRÐINI



### DIRVI

GENTUR OG KVINNUR SKULU TORA AT VILJA OG VELJA FÓTBÓLT, OG TAÐ MERKIR OFTA EISINI AT GANGA NÝGGJAR, ÓROYNDAR LEIÐIR. KVINNUR Í FÓTBÓLTI HAVA DIRVI TIL AT BJÓÐA SEG FRAM OG GERA SEG GALDANDI.

### VIRÐING

GENTUR OG KVINNUR HAVA KRAV UPP Á VIRÐING, Á VØLLINUM OG UTTANFYRI, BÆÐI FRÁ ØÐRUM OG FRÁ SÆR SJÁLVUM. VIT VÍSA HESA VIRÐINGINA Í ORÐUM OG GERÐUM, TÁ VIT FÁAST VIÐ OG UMRØÐA GENTU- OG KVINNUFÓTBÓLT.

### ÁHALDNI

VIT ARBEIÐA HART OG MIÐVÍST FYRI FRAMGONGD OG EINARI HUGBURÐSBROYTING, OG SLÍKT VERÐUR IKKI FRAMT FRÁ DEGI TIL DAGS. TÍ ERU VIT ÁHALDANDI, OG VIT REISA OKKUM ALTÍÐ UPP AFTUR.

# 1

# ÚRVAL OG LANDSLIÐ

**Okkara bestu spælarar skulu gerast betri**, soleiðis at vit gerast kappingarførar í altjóða høpi. Í fyrstu atløgu ætla vit at kappast við londini, sum í dag eru eitt styrkislag omanfyri okkum.

Viljin og drívmegin má koma frá okkara spælarum, men sum Fótbóltssamband stremba vit eftir at geva teimum best møguligar umstøður og møguleikar.

Arbeiðsorkan kring úrval og landslið verður tí uppraðfest, og serligur dentur verður lagdur á fysiska partin.



# 1 ÚRVAL OG LANDSLIÐ

## VIT VILJA

- HÆKKA STØÐIÐ OG BETRA UMSTØÐURNAR HJÁ LANDSLIÐUNUM
- LEGGJA DENT Á FYSISKA VENJING OG FRAMGONGD
- VEITA GENTUM OG DREINGJUM EITT JAVNT GOTT ÚRVALSTILBOÐ

## HVUSSU?

- ØKJA FÓTBÓLTSFAKLIGU ARBEIÐSMEGINA
- ØKJA UM LANDSLIÐSVIRKSEMIÐ
- ÁTØK TIL FRAMA FYRI FYSISKA VENJING





### ÚRVAL OG LANDSLIÐ

| DEILMÁL | MÁTIAMBOÐ / KPI | TÍÐARÆTLAN |
|---|---|---|
| FULLTÍÐARSETTAN A-LANDSLIÐSVENJARA | VENJARI SETT Í STARV | **1. MARS 2021** |
| GERA OG SETA Í VERK FYSISKAR MEGINREGLUR | ÁTAK: FYSISK STØÐULÝSING AV BETRI DEILDINI | **1. SEPTEMBER 2023** |
| RÁÐGEVINGARTILBOÐ TIL SPÆLARAR | ÚRVALS- OG LANDSLIÐSLEIKARAR ATGONGD TIL ÍTRÓTTAR- OG HEILSU-FAKLIGAN STUÐUL OG RÁÐGEVING | **1. JULI 2022** |
| ØKT LANDSLIÐSVIRKSEMI | MIN. ÁTTA LANDSDYSTIR UM ÁRIÐ | **2022 - 2025** |

# 2

# LUTTØKA

**Fleiri gentur skulu velja fótbólt.** Heilt ítøkiliga vilja vit tvífalda talið av gentuspælarum, og hetta skal eitt nú gerast við serligum átøkum innan rekruttering og varðveitslu, har gentur eru í fokus.

Venjarin hevur avgerandi týdning fyri hugin hjá gentum at spæla fótbólt, og tí verður stórur dentur eisini lagdur á at fáa fleiri kvinnuligar venjarar og at tryggja gentum eitt gott venjingartilboð og – umhvørvi.



# 2 LUTTØKA

## VIT VILJA

- TVÍFALDA TALIÐ AV SKRÁSETTUM GENTUSPÆLARUM
- TVÍFALDA TALIÐ AV KVINNULIGUM VENJARUM VIÐ A- OG B-LISENSI

## HVUSSU?

- STUÐLA UNDIR, AT GENTUR OG KVINNUR HAVA GÓÐAR VENJARAR
- REKRUTTERINGSÆTLAN OG -TILTØK
- VENJARALEIÐ FYRI KVINNUR
- SJÓNLIGAR FYRIMYNDIR




LUTTØKA

| DEILMÁL | MÁTIAMBOÐ / KPI | TÍÐARÆTLAN |
|---|---|---|
| KVALITETSVENJING TIL ØLL GENTULIÐ | STUÐUL TIL GENTUVENJARAR Í FELØGUM | **1. FEBRUAR 2022** |
| 18 KVINNUR VIÐ B-LISENSI (TVÍFALDING)<br>2 KVINNUR VIÐ A-LISENSI (TVÍFALDING) | ÁTAK: "VENJARALEIÐIN"<br>B-VENJARASK. ÓKEYPIS FYRI KVINNUR<br>TILVITAÐ REKRUTTERING AV KVINNULIGUM VENJARUM HVØRT ÁR | **31. DESEMBER 2024** |
| 75% AV GENTUM Í FØROYUM ROYNT FÓTBÓLT MINST EINA FERÐ SUM 8 ÁRA GAMLAR | SERLIGT REKRUTTERINGSÁTAK FYRI GENTUR | **1. APRÍL 2023** |
| | ÁTAK: BÓLTUR OG SPÆL (G&D) | **30. JUNI 2024** |
| SJÓNLIGAR KVINNULIGAR FÓTBÓLTSFYRIMYNDIR | FYRISKIPA TILTØK Í SAMBAND VIÐ LANDSLIÐSVIRKSEMI | **1. SEPTEMBER 2021** |
| | FRAMLEIÐA OG ÚTDEILA MARKNAÐARTILFAR | **1. MARS 2022** |

# 3

# FELØG OG KAPPINGAR

**Feløgini eru gerandisdagurin** og hjartaslátturin í føroyskum fótbólti. Tað er her, gentur og kvinnur skulu koma, spæla og mennast. Til tess er neyðugt, at gentur fáa eins góða móttøku og raðfesting í sínum felag, sum dreingir og menn gera.

Flest øll átøkini í menningarætlanini fevna tí um feløgini, bæði beinleiðis og óbeinleiðis. Umframt hetta, skulu kappingarleistur og loyvisskipan eftirhyggjast og dagførast við menning av gentu- og kvinnusíðuni fyri eyga.



## VIT VILJA

- HAVA EIN MENNANDI KAPPINGARLEIST VIÐ ATLITI TIL ALDUR, TILFEINGI OG STØÐI
- HAVA EINA LOYVISSKIPAN, SUM MENNIR UMSTØÐURNAR HJÁ KVINNULIGUM LEIKARUM
- ØKJA ÁSKOÐARATØLINI OG DYSTARDAGSUPPLIVINGINA TIL DYSTIR Í BESTU DEILDINI

## HVUSSU?

- ENDURSKOÐA KAPPINGARLEIST OG LOYVISSKIPAN
- FRAMLEIÐA VEGLEIÐINGAR OG HONDBØKUR TIL FELØG




FELØG OG KAPPINGAR

| DEILMÁL | MÁTIAMBOÐ / KPI | TÍÐARÆTLAN |
|---|---|---|
| DYSTARDAGSMANUAL Í BESTU DEILDINI | STANDARD FYRI ALLAR DYSTIR Í DEILDINI | **1. MARS 2022** |
| ENDURSKOÐA LOYVISSKIPANINA | STARVSNEVND TAKA STØÐU, GALDANDI FRÁ KAPPINGARBYRJAN 2023 | **1. JUNI 2022** |
| ENDURSKOÐA UNGDÓMS-KAPPINGARLEISTIN | KAPPINGARNEVND TAKA STØÐU ÁÐRENN KAPPINGARBYRJAN 2023 | **31. DESEMBER 2022** |
| FRAMLEIÐA VEGLEIÐING/ HONDBÓK Í REKRUTTERING OG VARÐVEITSLU AV GENTUM | GÓÐKENNAST AV AVVARANDI NEVND | **1. FEBRUAR 2023** |

# 4

# LEIÐSLA OG ARBEIÐSMEGI

**Fjølbroytni í nevndar- og leiðsluhøpi** er ynskiligt til tess at áhugamálini hjá øllum í felagsskapinum eru umboðað. Við hesum í huga, miðja vit ímóti at liva upp til ásettu javnstøðumálini hjá Ítróttasambandi Føroya.

Økta luttøkan skal ikki bara síggjast á vøllinum, men eisini uttanfyri vøllin, har fleiri kvinnur skulu lyfta sín part og vera við til borðs, tá avgerðirnar verða tiknar. Hetta vilja vit fremja við at eggja kvinnum til at halda seg framat, og við at skapa netverk og samanhald millum kvinnur í fótbóltsleiðslu.



## 4 LEIÐSLA OG ARBEIÐSMEGI

### VIT VILJA

- HAVA FLEIRI KVINNUR Í NEVND OG FÓTBÓLTSLEIÐSLU
- HAVA FLEIRI KVINNULIGAR DÓMARAR
- TRYGGJA, AT ÁHUGAMÁLINI HJÁ GENTUM OG KVINNUM ERU UMBOÐAÐ Í NEVNDAR- OG LEIÐSLUHØPI

### HVUSSU?

- SKAPA NETVERK OG KARMAR FYRI KVINNUR Í FÓTBÓLTSLEIÐSLU
- REKRUTTERINGSÁTØK FYRI KVINNULIGAR DÓMARAR





LEIÐSLA OG ARBEIÐSMEGI

| DEILMÁL | MÁTIAMBOÐ / KPI | TÍÐARÆTLAN |
|---|---|---|
| SJÁLVSTØÐUG KVINNUNEVND | (ENDUR)STOVNAST Á AÐALFUNDI FSF'S | **FEBRUAR 2022** |
| SKAPA NETVERK/FORUM FYRI KVINNUR Í FÓTBÓLTSLEIÐSLU | ÁTAK: SLÓÐARAR | **2021 - 2025** |
| REKRUTTERA KVINNULIGAR DÓMARAR | ÁTAK: DÓMARALEIÐIN | **2021 - 2023** |
| RØKKA JAVNSTØÐUMÁL ÍSF | KYNSBÝTI 70/30 Í 2025 | **31. DESEMBER 2025** |
| | KYNSBÝTI 60/40 Í 2030 | |

# 5

# UMRØÐA OG UMDØMI

**Neyðugt er at økja um áhugan** og virðingina fyri kvinnufótbólti. Kvinnufótbóltur og kvinnur í fótbólti skulu tí gerast meira sjónlig til frama fyri eina hugburðsbroyting.

Hetta verður eitt nú gjørt við at stroyma landsdystir og dystir í bestu deildini, umframt at gera kvinnur í fótbólti meira sjónligar í etableraða miðlalandslagnum.



## 5 UMRØÐA OG UMDØMI

### VIT VILJA

- FREMJA EINA HUGBURÐSBROYTING UM KVINNUR Í FÓTBÓLTI
- ØKJA ÁHUGAN FYRI OG UMRØÐUNA AV KVINNUFÓTBÓLTI

### HVUSSU?

- SETA Í VERK LÝSINGAR- OG SAMSKIFTISÁTØK
- STYRKJA HEILDARUPPLIVINGINA TIL LANDSDYSTIR
- STROYMA DYSTIR Í BESTU KVINNUDEILDINI




UMRØÐA OG UMDØMI

| DEILMÁL | MÁTIAMBOÐ / KPI | TÍÐARÆTLAN |
|---|---|---|
| STROYMA DYSTIR Í BESTU DEILDINI HJÁ KVINNUM | EIN DYST HVØRT UMFAR Í 2021<br>ALLAR DYSTIRNAR Í 2025 | **31. DESEMBER 2025** |
| MIÐLAUMRØÐA AV BESTU DEILDINI | DYSTARFRÁSAGNIR OG ÚRSLIT SJÓNLIG Í MIÐLALANDSLAÐNUM EFTIR HVØRT UMFAR | **31. DESEMBER 2021** |
| KYNINI UMBOÐAÐI JAVNT Í FSF MIÐLAHØPI | BÆÐI KYNINI UMBOÐAÐI Á ØLLUM MIÐLAPALLUM HJÁ FSF<br>ATLIT TAKAST TIL KYNSUMBOÐAN Í SAMSKIFTISÆTLANINI HJÁ FSF | **31. DESEMBER 2021** |
| STYRKJA HEILDARUPPLIVINGINA TIL LANDSDYSTIR | GRASSROOTS OG/ELLA SPONSORTILTØK TIL ALLAR HEIMADYSTIR HJÁ A-KVINNUM | **31. DESEMBER 2022** |
| | MINIMUM 1500 ÁSKOÐARAR TIL HVØNN HEIMADYST | **31. DESEMBER 2024** |

## TÍÐARÆTLAN

| 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 |
|---|---|---|---|---|
| • FULLTÍÐARSETTAN LANDSLIÐSVENJARA<br>• ÁTAK: **VENJARALEIÐIN** **ENDURTAKAST Í 2024**<br>• ÁTAK: **SLÓÐARAR**<br>• ÁTAK: **DÓMARALEIÐIN** **ENDURTAKAST Í 2023**<br>• ÁTAK: **BÓLTUR OG SPÆL**<br>• STROYMA 1 DYST / UMFAR<br>• TILTØK Í SAMB. VIÐ LANDSDYSTIR | • ENDURSTOVNA KVINNUNEVNDINA<br>• STUÐUL TIL GENTUVENJARAR<br>• ENDURSKOÐA LOYVIS-SKIPANINA<br>• DYSTARDAGSMANUAL TIL BESTU DEILDLINA<br>• ENDURSKOÐA UNGDÓMS-KAPPINGARLEISTIN<br>• MARKNAÐARTILFAR VIÐ KVINNULIGUM FÓTBÓLTSFYRIMYNDUM | • VEGLEIÐING/HONDBÓK Í REKRUTTERING OG VARÐ-VEITSLU AV GENTUM<br>• REKRUTTERINGSÁTAK<br>• ORÐA FYSISKAR MEGINREGLUR FYRI LANDSLIÐINI | • HÆGRI ÁSKOÐARATØL TIL LANDSDYSTIR<br>• 18 KVINNUR VIÐ B-VENJARAPRÓGVI OG TVÆR VIÐ A-VENJARAPRÓGVI | • STROYMA ALLAR DYSTIRNAR Í BESTU DEILDINI<br>• 70/30 KYNSBÝTI Í NEVNDUM<br>**VERTIR FYRI WU17 EM-ENDASPÆLI** |



## SAMAN FRAMÁ

**KVINNUR Á VØLLIN** fevnir um átøk og uppskot til frama fyri kvinnur í føroyskum fótbólti. Hesi eru øll týdningarmikil stig á leiðini frameftir, men fyri at røkka góðum úrslitum er neyðugt er við áhaldandi áminning og eftirmeting.

Ætlanin skal tí umrøðast og eftirmetast javnan í galdandi tíðarskeiðnum. Hetta merkir eisini, at Fótbóltssambandið fegið vil hoyra meiningarnar og hugskotini hjá tykkum, sum vilja vera við á ferðini fram.

Umrøða av átøkum til frama fyri kvinnur í fótbólti fer fram í avvarðandi nevnd hjá Fótbóltssambandi Føroya.

**Ring 351979 ella send okkum teldupost á fsf@football.fo**



# #BIÐUMBÓLTIN

FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA 2021

fsf.fo

DROYM.fo